A✪U
R
ARBEIÐSUMHVØRVISRÁÐIÐ
Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FR-110 Tórshavn ✪ Tlf. +298 17811 ✪ Fax +298 14489

# Á L I T
## viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi í Føroyum

14 NOV. 1996
F. L. j. nr. 1325 - 3/96 30

# VIÐMERKINGAR
# til
# lógaruppskotið.

Inngangur:

Eftir áheitan frá Føroya Landsstýri hevur Arbeiðsumhvørvisráðið arbeitt við uppskoti til nýggja lóg um arbeiðsumhvørvi.

Limirnir í Arbeiðsumhvørvisráðnum eru:

| | |
|---|---|
| 1. Jógvan Vágsheyg | Føroya Arbeiðsgevarafelag |
| 2. Ingeborg Vinther | Føroya Arbeiðarafelag |
| 3. Óla Jákup Guttesen | Føroya Handverksmeistarafelag |
| 4. George Niclassen | Føroya Handverkarafelag |
| 5. Tummas Hanus Dam | Føroya Keypmannafelag |
| 6. Birgerð Klein | Føroya Skrivstovu- & Kramb.felag |
| 7. Eli Davidsen. | Arbeiðseftirlitið, formaður. |

Sum varalimir (í somu nummarrøð) eru tilnevndir:

1. Arni Poulsen
2. Karl Johansen
3. Regin Joensen
4. Leivur Nygaard
5. Regin Andreasen
6. Erhard Jacobsen

Ráðið hevði fyrsta fund sín 15. februar 1988, har nevnda lógaruppskot var til viðgerðar.

Síðani eru hildnir 12 fundir og hevur Arbeiðsumhvørvisráðið á fundi tann 12. des. 1990 gjørt endaligt tilmæli um nýggja arbeiðsumhvørvislóg.

**Tórshavn, tann 12. desember 1990**

Jógvan Vágsheyg (sign.) Ingeborg Winther (sign.)

Óla Jákup Guttesen (sign.) George Niclassen (sign.)

Tummas Hanus Dam (sign.) Birgerð Klein (sign.)

Eli Davidsen, form. (sign.)

Viðmerkingar til lógaruppskotið.

Alment:

Sum grundarlag fyri hesum lógaruppskoti hevur ráðið havt lógina, sum galdandi er í Grønlandi um arbeiðsumhvørvi.

Grundin til at hendan lóg er nýtt sum fyrimynd fyri føroyska lógaruppskotinum er tann, at ráðið metir umstøðurnar og viðurskiftini annars í Føroyum og Grønlandi vera so lík, at stórir partar av grønlendsku lógini eisini passa til okkara viðurskifti.

Ráðið hevur tó eisini kannað rættarstøðuna í hinum grannalondum okkara og hevur orðaskifti verið um ymiskar reglur, sum galdandi vóru í hesum londum, og um tær áttu at verið settar í gildi í Føroyum eisini.

Høvuðsendamálið hjá ráðnum hevur tó verið at skapa eina lóg, sum er tillagað eftir teimum serføroysku viðurskiftunum og hevur ráðið gjørt endaliga uppskot sítt út frá hesum sjónarmiði.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Viðv. § 1:

Hendan grein ásetir endamál lógarinnar og er hetta tað sama, sum galdandi er í Danmark og hinum grannalondum okkara.

Viðv. § 2:

Greinin ásetir øki lógarinnar og er her eisini talan um sama øki, sum galdandi er í hinum norðurlondunum.

Viðv. § 3:

Hendan grein ásetir nærri fyriskipan um, í hvønn mun lógin er galdandi fyri loftferðslu, sjóvinnu og fiskivinnu.

Orsøkin til at lógin ikki í sínari heild er galdandi fyri hesi økir er tann, at umstøðurnar her eru so sermerktar, at ráðið eins og lógsmiðirnir í grannalondum okkara ikki meta, at arbeiðsumhvørvislóg, sum galdandi er á landi, í fullan mun er nýtilig fyri loftferðslu, sjóvinnu og fiskivinnu.

Ráðið hevur ikki sett uppskot fram um at fiskivinnan, sum er høvuðsvinna okkara, verður tikin við í hesa lóg, men ráðið loyvir sær at vísa á, at ein støðugt størri partur av fiskiflota okkara hevur verksmiðjur, har arbeiðið ikki stórvegis víkir frá arbeiðsumstøðunum innan fiskivinnuna á landi, og eigur tí at verða miðað ímóti, at samstarv fæst ímillum t.d. Arbeiðseftirlitið og Skipasýnið um

at samskipa arbeiðið soleiðis at støðið, tá hugsa verður um arbeiðsumhvørvið t.d. viðvíkjandi trygd, í tann mun hetta ber til, verður tað sama fyri verksmiðjuarbeiði á sjógv og á landi.

Viðv. § 4:

Sambært hesari grein, skal trygdararbeiði í størst møguligan mun fara fram á sjálvum virkinum og er ein grundin til hesa skipan tann, at ógjørligt er hjá Arbeiðseftirlitinum at hava dagligt eftirlit av tí sum fyriferst innanfyri vinnuvirkir.

Sambært hesari grein, verður tað eisini serliga víst á, at eisini tá talan er um minni virkir t.e. virkir, har minni enn 10 fólk starvast, hevur leiðsla og starvsfólk skyldu til at vísa ansni viðvíkjandi arbeiðsumhvørvistrupulleikum, sum kunnu stinga seg upp.

Viðv. § 5:

Talið á arbeiðsfólki er í hesum uppskoti sett til 10, og er tað sama tal, sum í t.d. Danmark og Grønlandi.

Viðvíkjandi 2. stk. í frammanfyri nevndu grein er at viðmerkja, at ætlanin við hesari skipan er, í størst møguligan mun at miðspjaða trygdararbeiði, sum gjørt verður.

Trygdarbólkarnir verða skipaðir innanfyri hvørt arbeiðsøki og er hetta liður í somu miðspjaðing.

Arbeiðsleiðarin hevur vanliga beinleiðis leiðsluna og eftirliti við arbeiðsøkinum og verður tað tí mett nattúrligt, at hann er annar parturin í trygdarbólkinum.

Í sambandi við 3. stk. er at viðmerkja, at tað eru starvsfólkini, sum velja trygdarumboð og skal við hesum skiljast, at tað eru øll, sum eru í starvi arbeiðsgevarans, íroknað lærlingar, starvsmenn og onnur, sum tó ikki skulu hava beinleiðis leiðslurætt.

Viðvíkjandi 4. stk., er heimild til hjá Arbeiðseftirlitinum at veita undantak frá kravinum um serligar trygdarbólkar, men hevur ráðið lagt serligan dent á, at hetta bert eigur at verða gjørt, har vissa er fyri, at hetta ikki førir við sær verri trygdarstøðu enn tann, sum fyriskipa verður samsvarandi hesari lóg.

Viðv. § 6:

Tá ið tosað verður um umboð fyri arbeiðsgevaran ið hevur ábyrgdina av virkinum, skal hetta skiljast sum persónur, sum kann taka avgerðir arbeiðsgevarans vegna viðvíkjandi teimum trygdar og heilsuviðurskiftum, sum skulu viðgerast í trygdarnevndini.

Uppgávan hjá trygdarnevndini er m.a. at vera ráðgevi arbeiðsgevarans í samband við trygdar- og heilsuspurningar.

Nevndin hevur harafturímóti ikki heimild til at taka avgerðir í samband við fremjan av trygdar- og heilsutiltøkum á virkinum.

Tá arbeiðsgevarin ella hansara umboð eru limir í nevndini, vil tað vanliga tó vera soleiðis, at arbeiðsgevarin er samdur í og fylgir teimum ráðum, sum nevndin gevur.

Viðv. § 7:

Ráðið metir, at trygdarnevndin á teimum einstøku virkjunum, eigur at tilnevna ein dagligan leiðara av trygdararbeiðinum, soleiðis at hesin kann fyriskipa dagliga arbeiði hjá nevndini.

Ein fyritreyt er sjálvsagt, at arbeiðsgevarin letur viðkomandi ta tíð, sum neyðug er, fyri at gera slíkt arbeiði.

Viðvíkjandi øðrum petti kann viðmerkjast, at ráðið er av tí áskoðan, at Landsstýrið bert í serstøkum førum eigur at gera frávik frá reglunum í hesari lóg.

Eisini hevur Landsstýrið sambært nevndu grein rætt til at laga reglurnar eftir teimum serligu viðurskiftunum á ávísum arbeiðsplássum og kann ráðið her vísa sum dømi, at talan kann vera um arbeiðspláss innan byggivirksemi, handlar, hotel og matstovuvinnu, reingeringsvinnu, flutningsvinnu umframt skrivstovu og fyrisiting.

Ráðið viðmerkir í hesum sambandi, at tað sjálvsagt í øllum førum má vera soleiðis, at trygdin ikki verður sett til viks, og at frávik bert verða gjørd, har haldgóðar metingar vísa, at trygdarviðurskiftini eru nóg væl vard, eisini við teimum broytingum, sum Landsstýrið í teimum einstøku førunum fremur.

Viðv. § 8:

Tað kemur sjálvsagt at vera ymist frá virki til virki, og m.a. grundað á støðd og arbeiðsumstøðurnar, hvussu long tíð nattúrliga verður nýtt til trygdar og heilsuarbeiði.

Fyrst og fremst er tað arbeiðsgevarin, sum avger, hvussu nógv tíð skal setast av til slíkt arbeiði.

Verður ósemja um ta tíð sum nýtast skal til slíkt arbeiði, kann málið leggjast fyri eftirlitsumdømið.

Avgerðin frá eftirlitsumdøminum kann sambært grein 64 kærast til Arbeiðsumhvørvisráðið og ráðsins avgerðir kunnu síðani kærast til Landsstýrið.

Viðvíkjandi 2. petti kann viðmerkjast, at tað eisini í hesum føri í fyrstu atløgu er arbeiðsgevarin, sum metir um trygdarbólkarnir og trygdarnevndirnar skulu luttaka í teimum ymisku ráðleggingunum og kann avgerð arbeiðsgevarans sambært grein 54 kærast inn fyri Arbeiðseftirlitið.

Víðari kærumøguleiki er sum frammanfyri ásett heimilaður í grein 64.

Viðvíkjandi 4. petti vísir ráðið á, at arbeiði hjá trygdarbólkunum og trygdarnevndunum eru av alstórum týdningi fyri alt trygdararbeiði og eigur hetta arbeiði tí at vera væl lagt til rættis, fyri at fáa sum mest burturúr.

Tað er ráðsins meting, at nattúrligt er at taka trygdarbólkin og trygdarnevndina við í samband við at virkið leggur til rættis arbeiðsgongd og innrætting av arbeiðsplássi.

Tað eigur tí at vera ein fyritreyt, at bæði trygdarbólkurin og trygdarnevndin fáa høvi til at luttaka í teimum ætlanum, sum gjørdar vera, áðrenn virkið tekur endaliga støðu í slíkum málum.

<u>Viðv. § 9:</u>

Arbeiðsgevarin hevur eftir 1. petti skyldu til at rinda allar tær útreiðslur og inntøkumiss, sum trygdarumboði verður fyri, í samband við trygdararbeiði.

Her eru eisini íroknaðar útreiðslur og inntøkumissur í samband við luttøku av teimum í § 8 nevndu ráðleggingum.

Ráðið kann í hesum sambandi viðmerkja, at ein ástøðumannaavgerð í fakligum gerðarrætti 4. juli 1975 í Danmark, nærri vísir, hvat próvtilfar skal til, fyri mistari inntøku.

Málið snúði seg um, at virkið bert vildi gjalda trygdarumboðnum ta vanligu tímalønina, hóast trygdarumboðið hevði starvast við akkordskipan, og soleiðis hevði havt eina hægri løn.

Ástøðumaðurin kom til ta niðurstøðu, at viðkomandi starvsfólk skuldi hava endurgjald fyri tann veruliga lønarmissin, t.v.s. samsvarandi tí akkordløn, sum viðkomandi hevði fingið, um hann hevði starvast tann dag, skeiðvirksemi fór fram.

Viðvíkjandi 2. petti er at viðmerkja, at ráðið heldur tað vera rætt, at Landsstýrið fær møguleika fyri, har tørvur er á hesum at áseta reglur um at landskassin letur tilskot til tær frammanfyri nevndu útreiðslur.

Viðvíkjandi 3. petti er at viðmerkja, at ráðið metir at tað er nattúrligt, at limirnir í trygdarskipanini á sama hátt sum álitisfólkið, eru vardir móti uppsøgn.

Hetta skal forða fyri, at tey fólk, sum luttaka í trygdarskipanini, skulu kunna koma undir trýst frá arbeiðsgevaranum, í samband við útinning teirra av trygdararbeiðinum.

Sjálvt um neyðugt verður hjá virkjunum at minka um arbeiðsmegina, kann arbeiðsgevarin ikki uttan víðari siga trygdarumboðið úr starvi.

Viðvíkjandi 4. stk. er at viðmerkja, at danska lógin leggur heimildina til at avgera hesar trætur til Arbeiðsrættin.

Av tí, at vit ikki hava Arbeiðsrætt í Føroyum, metir ráðið, at vanligu dómstólarnir eiga at hava

hesar heimildir, har fakliga gerðarrættarskipanin ikki kann nýtast. Sama skipan er galdandi í Grønlandi.

Viðv. § 10:

Ásetingarnar í hesari grein skulu síggjast í samanhangi við hinar reglurnar í kapittul 2 og er endamálið við øllum hesum ásetingum at royna at gera virkið
ført fyri sjálvt at loysa teir trygdar- og heilsutrupulleikar, sum eru ella koma at vísa seg á virkinum.

Sum kunnugt, so verður í ídnaðinum tikið í nýtslu ymisk nýggj evnir og nýggjar arbeiðsgongdir og metir ráðið tí, at Landsstýrið skal hava heimild til áseta nærri reglur um møguliga sakkøna hjálp, t.d. í slíkum førum.

Arbeiðsgevarin kann á ymiskan hátt lúka sínar skyldur, samsvarandi teimum reglum, sum Landsstýrið møguliga kemur at seta í verk, av tí at avgerandi í slíkum førum er, at tað í veruleikanum verður latin tann sakkøna hjálp sum neyðug er.

Arbeiðsgevarin hevur soleiðis í fyrstu atløgu rættin til at meta um, hvussu henda sakkøna hjálp kann fáast til vega.

Í hesum føri verður eisini víst til teir kærumøguleikar, sum eru ásettir sambært seinni greinum í hesari lóg.

## Kapittul 3

Hetta kapittul ásetir grundleggjandi skyldurnar hjá arbeiðsgevara, arbeiðsleiðarum, starvsfólki, útvegamonnum, innleggjarum, umvælarum, ráðleggjarum o.ø.

Í mun til galdandi lóggávu er talan um eina víðkan av tí persónsbólki, og eisini av teimum skyldum sum álagt verður hesum bólkum.

Viðv. § 11:

Í samband við hesa grein, hevur tað alstóran týdning at áseta nærri, hvat liggur í fyribrigdinum arbeiðsgevari, av tí, at tað bert er hann, sum sambært § 66 og 67 í uppskotinum hevur objektiva ábyrgd og kann dømast bót, grundað á tey brot, sum nevnd eru í frammanfyri nevndu lógargrein.

Sambært rættarpraksis, so er undir núgaldandi skipan í Danmark, persónur, sum hevur havt ein sjálvstøðugan lut í útinnanini av arbeiðinum, dømdur sambært objektiva arbeiðsgevarareglunum, men skal tað nú bert vera sjálvur arbeiðsgevarin, sum eigur at kunna dømast sambært nevndu grein.

Undir núgaldandi skipan, hevur objektiva ábyrgdin t.d. verið løgd á stjórar í partafeløgum og býarverkfrøðingar hjá kommunum.

Broytingin í lógarreglunum í Danmark grunda seg á fyrireikingararbeiði, sum gjørt var í nevnd, hvørs niðurstøða var latin løgmálaráðnum 03.11.1975.

Í nevndu niðurstøðu verður sagt, at objektiva ábyrgdin bert eigur at vera áløgd virkiseigarum, soleiðis at skilja, at tað er tann persónur sum fær fíggjarligan vinning av rakstrinum av virkinum.

Útfrá hesum hevur danska arbeiðsmálaráðið allýst arbeiðsgevaran sambært arbeiðsumhvørvislógini, soleiðis at tað er tann persónur sum eigari av virkinum, partvís hevur avgerandi heimildirnar, tá hugsað verður um at leggja til rættis arbeiðsgongdina á virkinum, og bygnaðin, og partvís beinleiðis hevur fyrimunin av rakstrarúrsliti hjá virkinum. Har talan er um virkir sum eru bygd upp sum kollektivar eindir, t.d. partafeløg, lutafeløg ella líknandi, vil objektiva ábyrgdin sum høvuðsregla verða gjørd galdandi móti kollektivu eindini sum soleiðis.

Um vit leggja hesa allýsing til grund, má talan vera um eina broyting í mun til tað sum vit nú leggja í orðið arbeiðsgevari sambært lógini, sum viðvíkjur arbeiðaravernd.

Hetta førir við sær, at vit t.d. í partafelag mugu meta nevndina/nevndarformannin sum arbeiðsgevari, meðan stjórin, um so er at hann ikki lúkar definitiónina sum nevnd er frammanfyri, nú eftir øllum at døma bert má metast sum arbeiðsleiðari, tá ið vit tosa um reglurnar í lóg um arbeiðsumhvørvi.

Tá talan er um kommunur, so er tað bygdaráðsformaðurin/borgarstjórin, sum við atliti til hesa lóg má metast sum arbeiðsgevari.

Spurningurin um virkisleiðarar kunnu metast sum arbeiðsgevarar má tó metast útfrá hvørjum virki sær, við einari ítøkiligari meting, og í grannalondum okkara hava teir víst á, at har leiðarin í veruleikanum hevur eina støðu har hann hevur endaliga orðið, tá talan er um avgerðir sum takast skulu, so eigur møguleiki at vera fyri, eisini tá talan er um brot á lóg um arbeiðsumhvørvi at meta viðkomandi sum arbeiðsgevara.

Tann endaliga ásetingin av, hvør ið sambært lógina skal metast sum arbeiðsgevari, verður sjálvsagt ásett av rættinum.

Viðv. § 12:

Ráðið hevur mett, at møguleiki skal vera fyri hjá Arbeiðseftirlitinum at áseta nærri reglur um, hvat eigur at vera av útgerð til fyrstuhjálp á virkjum.

Eisini kann tørvur vera á serstakari skaðastovu ella øðrum útbúnaði á størri virkjum, somuleiðis sum Arbeiðseftirlitið her kann krevja, at minst eitt fólk hevur tikið góðkent skeið í fyrstuhjálp.

Viðv. § 13:

Skyldan til at hava eftirlit snýr seg um tað arbeiði sum starvsfólki ger, og harafturat, at arbeiðsgongdin annars er forsvarlig.

Tá mett verður um arbeiðsgevarin hevur hildið leiðbeiningar og eftirlitsskyldur sínar, má havast í huga, tann vandi, sum er tengt at tí einstøku arbeiðsgongdini, soleiðis at har arbeiðsgongdin er meira vandamikil, og har vandin fyri vanlukku ella heilsuskaða er størri, har eigur eftirlitið sjálvsagt eisini at vera strangari.

Viðv. § 14:

Í hvønn mun arbeiðsgevarin eigur at kunna arbeiðsfólkið, er partvís tengt at fyritreytunum hjá tí einstaka starvsfólkinum, og partvís av hvat slag av arbeiði talan er um.

Størri krav eigur at vera sett til kunningarskylduna hjá arbeiðsgevaranum, har talan er um arbeiði við serligum vanlukku og heilsuskaðiligum vanda.

Sama er galdandi har talan er um yngri starvsfólk og nýtt fólk sum kemur í starv, og soleiðis ikki hevur tað innlit sum neyðugt er, fyri á tryggan hátt at passa starv sítt.

Viðvíkjandi 2. petti kann viðmerkjast, at starvsfólki eigur at fáa upplæring og leiðbeining í nýtslu av verndartiltøkum, eisini persónligum verndarlutum.

Eisini hevur arbeiðsgevarin skyldu til seinni at kanna, at tær áður givnu leiðbeiningar verða fylgdar av starvsfólkinum.

Viðvíkjandi 3. petti er at siga at hugsað verður her um økir, har serligur tørvur er á leiðbeining.

Viðv. § 15:

Hendan lógargrein vísir hvønn dent lógaruppskotið leggur á samstarvi á hvørjum einstøkum virki.

Umframt sjálvur at luttaka, ella lata umboð sítt luttaka í samstarvinum, skal arbeiðsgevarin eisini tryggja, at samstarvið støðugt heldur áfram á ein hóskiligan hátt.

Brot á hesa grein verða revsað sambært § 65.

Viðv. § 16:

Endamálið við lógargreinini er at áseta samstarvsskyldu fyri fleiri arbeiðsgevarar á sama arbeiðsplássi til frama fyri trygdina og heilsuna, hjá øllum sum starvast á arbeiðsplássinum.

Mett verður at trygdin verður betur á arbeiðsplássinum, har hvør arbeiðsgevari ikki bert skal taka sær av trygdini hjá sínum starvsfólkum, men at ein samstarvsskylda eisini er galdandi millum allar arbeiðsgevararnar og øll tey starvsfólk, sum har starvast.

Orðið arbeiðsstað gevur rúmari ræsur enn orðið virki ella arbeiðspláss.

Viðvíkjandi 2. petti kann viðmerkjast, at Landsstýrið t.d. kann áseta nærri reglur um at arbeiðsgevararnir kunnu sínámillum avtala, hvør av teimum skal hava ábyrgdina av arbeiðsviðurskiftum á arbeiðsstaðnum.

Viðv. § 17:

Hóast nevndu grein, so hava øll sjálvsagt rætt til at venda sær til Arbeiðseftirlitið, í samband við viðurskiftir sum snúgva seg um trygd og heilsu á arbeiðsplássum.

Um talan er um smá arbeiðspláss har hvørki trygdarumboð ella álitisfólk eru, skulu starvsfólkini hava kunnleika um tær avgerðir, sum Arbeiðseftirlitið hevur tikið.

Er talan um stór arbeiðspláss við fleiri deildum, so hevur trygdarumboðið bert krav uppá at fáa kunnleika um avgerðir frá Arbeiðseftirlitinum, sum snúgva seg um viðkomandi deild.

Sama er galdandi við álitisfólki, soleiðis at hesi skulu hava kunnleika um avgerðir sum snúgva seg um tann starvsbólk sum tey umboða.

Grundin til at nevnda regla bert viðger skrivligar avgerðir frá Arbeiðseftirlitinum er, at tær munnligu fráboðanirnar oftast ikki eru so nágreiniligar sum tær skrivligu.

Viðv. § 18:

Arbeiðseftirlitið kann krevja at kanningar verða settar í verk, bæði tá talan er um beinleiðis illgruna viðvíkjandi viðurskiftum á einum virki, og eisini sum lið í eini meira almennari kanning ella støðugum eftirliti av viðurskiftum innan eitt virkisøki.

Sjálvt um krav ikki er sett fram frá Arbeiðseftirlitinum um kanningar, hevur arbeiðsgevarin skyldu til, møguliga eftir tilmæli frá trygdarskipanunum at fremja kanningar á økjum, har trygdar og heilsuviðurskiftini gera tað neyðugt.

Til dømis skulu kanningar av tekniskum hjálpitólum ikki bert fremjast áðrenn hesi verða tikin í nýtslu, men tørvur kann eisini vera á at fremja kanningar aftan á møguligar broytingar av hjálpitólunum, ella annars við jøvnum millumbilum.

Har talan er um arbeiðsvanlukku ella óvanliga nógva sjúku hjá starvsfólkum, vil serligur tørvur ofta verða á at kanna arbeiðsviðurskiftini nærri.

Sjálvt um einki er nevnt í lógini um hetta, skal arbeiðsgevarin sjálvur rinda fyri tær kanningar, sum nevndar eru í hesari grein.

Viðv. § 19:

Grundin til at ráðið hevur sett inn hesa lógargrein, sum svarar til orðingina í § 23 í donsku lógini

er, at sambært teir dómar, sum feldir eru á hesum øki, hevur verið ivasamt um leiðslan fyri t.d. partafeløgum kundi revsast sambært teimum greinum, sum seinni í hesari lóg áseta revsingar fyri brot á ásetingarnar í lógini.

Ætlanin við hesari lógargrein er, at teir persónar sum standa fyri leiðsluni av t.d. partafeløgum, eisini skulu kunna revsast fyri brot teir hava framt á ásetingarnar í lógini.

Viðv. § 20:

Definitiónin av arbeiðsleiðara svarar til definitiónina í starvsmannalógini.

Tað er soleiðis ein konkret avgerð í hvørjum einstøkum føri, hvør kann metast sum arbeiðsleiðari og kann talan t.d. vera um driftsleiðarar, verkførarar, arbeiðsformenn og aðrar.

Tá talað verður um arbeiðið á virkinum ella pørtum av hesum, so kann eisini talan vera um arbeiði, sum verður gjørt uttandura.

Viðv. § 21:

Arbeiðsleiðarin skal sambært orðingini síggja til at materiellu reglurnar í lógini verða fylgdar.

Sambært § 65 er ábyrgdin hjá arbeiðsleiðaranum ikki objektiv.

Arbeiðsleiðarin skal sambært orðingini taka tær neyðugu avgerðirnar innanfyri sítt heimildarøki, men harafturat eigur hann at geva tilmæli um tiltøk, sum hann ikki sjálvur hevur heimild til at seta í verk, ella í hvussu er at geva arbeiðsgevaranum fráboðan um tørvin á slíkum tiltøkum.

Viðvíkjandi 2. petti er at viðmerkja, at sambært orðingina, so hevur arbeiðsleiðarin bæði rætt og skyldu til at fremja tey neyðugu tiltøk tá talan er um trot ella brek.

Viðv. § 22:

Brot á hesa grein verða revsaði sambært § 65.

Viðv. § 23:

Sambært § 65, so kunnu arbeiðsfólkini eisini revsast, um tey ikki fylgja reglunum í hesari lóg.

Sum arbeiðsfólk er at skilja, hvør tann, sum verður settur í tænastu hjá arbeiðsgevara og sum ikki hevur leiðsluheimildir.

Arbeiðsfólki hevur ábyrgd av, at tey eisini halda tær materiellu reglurnar í lógini, umframt møguligum kunngerðum.

Tá 1. petti sigur at tiltøkini skulu virka sum ætlað, so ber hetta í sær, at t.d. verndartiltøk á maskinum og útsúgvingarskipanir, eins og ásett persónlig verndartiltøk skulu nýtast.

Viðv. § 24:

Sí viðmerkingarnar til § 22.

Viðv. § 25:

Viðvíkjandi 1. petti, verður serliga hugsað um byggiarbeiði.
Viðvíkjandi 2. petti, kann talan t.d. vera um installatións - ella umvælingararbeiði.

Viðv. § 26:

Lógarreglan fevnir um eina og hvørja veiting, t.v.s. eisini har talan er um ikki vinnuliga veiting av brúktum tekniskum tólum ella amboðum, t.d. tá ið hetta verður latið uttan kostnað.

Ábyrgdin áliggur í flest øllum førum framleiðaranum ella innflytaranum, tá teir við atliti til sjálvar forhandlararnar mugu metast sum teir sakkønu.

Millumhandlarar vilja vanliga bert hava ábyrgd, tá ið serligar umstøður gera seg galdandi.

Sambært dómum í grannalondum okkara, so verður ábyrgdin heldur ikki løgd á starvsfólki hjá t.d. innflytaranum.

Sambært § 65 er revsiábyrgdin ikki objektiv.

Við teknisk hjálpartól er at skilja, t.d. stigar, stillasir, bingjur og tílíkt.

Leiðbeiningarnar eiga at vera orðaðar á føroyskum og skulu bert í undantaksføri orðast á øðrum máli, sum øll í Føroyum skilja.

Viðvíkjandi 3. petti skal viðmerkjast, at innflytari ella framleiðari, ikki bert tá ið Arbeiðseftirlitið krevur tað, men eisini tá ið viðurskiftini annars gera tað neyðugt, hevur skyldu til at fremja tær nevndu kanningar og royndir.

Viðv. § 27:

Henda lógargrein viðvíkir bert maskinum, meðan § 26 eftir orðingini hevur eitt meira alment gildi.

Sambært § 30, so fevnir § 27 tó eisini um útvegamenn og aðrar, sum fáa til vega evnir og tilfar.

Viðv. § 28:

Hendan regla er eisini galdandi, um tað er framleiðari ella sølumaður sum fremur innleggingararbeiði, og sama er galdandi, um ein útleigari ella ein sum lænir út, sjálvur fremur innleggingina hjá leigaranum ella tí sum lænir.

Viðv. § 29:

Hendan áseting er orðað sambært "ILO codes of Practice, Safety and health in building and civil engineering work" frá 1972.

Hetta er dømi um tann dent, sum lagdur eigur at vera á arbeiðsumhvørvisspurningin, longu frá byrjan av, tá ætlanir verða gjørdar.

Meiningin er tó ikki, at teir sum gera projektini, skulu leggja seg út í t.d. arbeiðsháttin hjá byggimeistarum og tey hjálpitól sum teir nýta, eins og lógarreglan heldur ikki tekur ábyrgdina frá byggimeistarum í samband við arbeiði teirra.

Viðvíkjandi seinasta punktum í lógargreinini skal viðmerkjast, at her er talan um ráðgeving, sum kann hava týdning fyri trygd og heilsu.

Reglan ber í sær m.a., at ráðgevandi verkfrøðingafeløg sum fremja útrokningar í samband við teknisk hjálpartól, skulu síggja til at hesi hjálpartól lúka krøvini, í arbeiðsumhvørvislógini.

Viðv. § 30:

Nærri fyriskipanir hjá innflytaranum eru ásettar í § 40 og 41.

Viðv. § 31:

Í samband við 2. petti kann viðmerkjast, at t.d. tá teknisk hjálpartól ikki lúka krøvini í arbeiðsumhvørvislógini, hevur, umframt innflytarin og arbeiðsgevarin, eisini brúkarin ábyrgd.

Viðv. § 32:

Av tí at serligar umstøður kunnu vera, sum gera tað ráðiligt at víkja frá alment galdandi reglunum, hevur ráðið mett, at rætt er at taka við í lógina hendan møguleikan, fyri at gera frávik í reglunum.

Viðv. § 33:

Við byggiharra er vanliga at skilja, tann, fyri hvørs rokning byggiútbúnaðarella umvælingararbeiði verður framt.

Neyðugt er ikki at byggiharrin er arbeiðsgevari og kann í hesum sambandi vísast til § 2, stk. 3, nr. 1.

Byggiharrin skal áðrenn byggiarbeiði verður byrjað, taka støðu til, um hann sjálvur skal átaka sær samskipanina ella um hann heldur letur ein annan samskipara fremja hetta arbeiði.

Um samskipanin ikki virkar sum hon skal, so kann byggiharrin ella samskipari hansara revsast við bót sambært § 65.

Lógin tekur ikki støðu til um byggiharrin ella samskiparin koma undir endurgjaldsskyldu í teimum førum, har samskipanarskyldan ikki verður lokin.

Endamálið við greinini er at fáa samskipa tey felags trygdartiltøkini fyri tey ymisku virkisøkini á sama byggiplássi.

Byggiharrin og samskipari hansara hava bert skyldu til at samskipa trygdararbeiði á plássinum, meðan tað fult út eru teir einstaku arbeiðsgevararnir, sum hava ábyrgdina fyri at lógarinnar reglur verða hildnar viðvíkjandi teimum fólkum, sum teir sjálvir hava í starvi.

## Kapittul 4:

Hetta kapittul ásetir grundleggjandi reglurnar, sum hava tilknýti til útinnanina av arbeiðinum.

Í sambandi við metingina av arbeiðsstøðuni, skulu reglurnar serliga samanberast við ásetingarnar í kapittul 5, 6 og 7.

Tað er ynskiligt, at spurningarnir um arbeiðsumhvørvi ikki bert verða tiknir til viðgerðar í sambandi við útinnanina av arbeiðinum, men longu tá ið tær fyrstu fyrireikingarnar verða framdar, í samband við ætlað arbeiði.

### Viðv. § 34:

Lagt eigur at vera til merkis, at hendan áseting sambært § 2, stk. 3, nr. 2, eisini fevnir um arbeiði, sum ikki verður gjørt fyri arbeiðsgevara, umframt arbeiði, sum nevnt er í § 2, stk. 2.

### Viðv. § 35:

Viðvíkjandi 1. petti, punkt 1 kann viðmerkjast, at bannið kann avmarkast til ávísar bólkar av starvsfólki, t.d. kvinnur við barn, eldri ella brekað.

Viðvíkjandi 2. punkti kann viðmerkjast, at á serligum arbeiðsplássum kann tørvur vera á ymiskum verndarlutum og serligum arbeiðsklæðum.

Viðv. § 36:

Í sambandi við at lógin verður sett í gildi verða nógvar kunngerðir, sum galdandi eru í løtuni, framvegis í gildi, til nýggjar kunngerðir verða gjørdar.

## Kapittul 5: (Arbeiðsplássið).

Viðv. § 37:

Sum nevnt frammanfyri, so er tað av avgerandi týdningi, at atlit verður havt til arbeiðsumhvørvi og teir spurningar, sum upp kunnu stinga seg í hesum sambandi longu tá sjálvt arbeiðsplássið verður innrættað.

Krøvini til innrættingina verða sjálvsagt tengd at hvat slag av arbeiði talan er um, og hvørji hjálpartól, evnir og tilfar verða nýtt í arbeiðsgongdini.

Viðv. § 38:

Av tí at arbeiðsumhvørvislógin er ein rammulóg, eru ongar nágreiniligar reglur ásettar í lógini, um hvussu arbeiðsplássið skal innrættast.

Ætlanin er at reglurnar skulu ásetast frá umsitingini útfrá teimum almennu rætningslinjunum, at arbeiði skal vera innrættað soleiðis, at tað lýkur øll trygdar og heilsulig krøv.

Serligur dentur skal leggjast á, at arbeiðsumhvørvi skal vera í tráð við ta teknisku og sosialu gongdina í samfelagnum.

Tær reglurnar, sum nærri verða ásettar frá umsitingini, kunnu t.d. snúgva seg um byggiháttin.

Teknisk hjálpartól eru eisini fevnd av hesari lógarheimild, í tann mun, nýtslan av hesum hava týdning fyri innrættingina av arbeiðsplássinum. Tað kann t.d. vera maskinur, sum halda nógvan gang.

## Kapittul 6: (teknisk hjálpartól).

Ásetingarnar í hesum kapittli eru galdandi fyri øll, sum hava við teknisk hjálpartól at gera, bæði tann sum letur hjálpartólaætlanina og hann, sum nýtir tólini, sjálvt um arbeiði ikki beinleiðis verður gjørt fyri ein arbeiðsgevara.

Her verður víst til § 2, stk. 3, nr. 3 í lógini.

Viðv. § 39:

Reglan í § 39 fevnir um øll sløg av skipanum, maskinum og hjálpartólum.

Talan kann verða um maskinur, amboð, elevatorar, kranar, stillasir, bingjur og annað.

Bæði hann sum letur nevndu hjálpartól og hann sum nýtir tey, hevur fulla ábyrgd fyri, at hesi tól eru framleidd og sett upp á forsvarligan hátt.

Skyldan í samband við nýtsluna áleggur tó bert brúkaranum, t.v.s. arbeiðsgevaranum, arbeiðsleiðaranum og starvsfólki, sum brúkar hesi tól.

Viðv. § 40:

Hendan lógaráseting gevur Landsstýrinum heimild til at áseta reglur um tey ymisku sløgini av hjálpartólum.

Her kann t.d. vera talan um ásetingar av markvirðum fyri óljóði, ristingum o.a. og er tað tí ikki nøkur beinleiðis treyt, at talan er um beinleiðis vandaumstøður, men kann Landsstýrið við atliti til trygd og heilsu, áseta slíkar reglur.

Viðvíkjandi stk. 1, 2. punkti, kann viðmerkjast, at sambært § 54, so er ætlanin at Arbeiðseftirlitið eftir áseting frá Landsstýrinum, fær heimild til at geva ummæli ella góðkenning, t.d. fyri ymiskar bólkar av tólum.

Um sokallað slaggóðkenning (typegodkendelse) verður givin, so førir hetta við sær, at maskinslagi til eina og hvørja tíð, kann seljast, so leingi sum maskinurnar halda tær ásetingar, sum liggja til grund fyri góðkenningini.

Tá tosað verður um ummæli, er hetta at skilja soleiðis, at ein meting fer fram av einstøkum viðurskiftum, sum hava munandi trygdar- ella heilsuligan týdning, og har sakkunnleikin hjá Arbeiðseftirlitinum ger slíka meting møguliga.

Tá tosað verður um góðkenning, er hetta at skilja á tann hátt, at ein nágreinilig gjøgnumgongd verður gjørd av ætlanini, har eftirlitið partvís metir tey einstøku viðurskiftini og ger eina heildarmeting, alt útfrá, hvat verður mett forsvarligt, við atliti til trygdina og heilsuviðurskiftini.

Talan kann t.d. vera um góðkenningar av ætlanum í samband við innrætting av arbeiðsstað, og viðvíkjandi tekniskum hjálpartólum.

Viðvíkjandi 1. petti, nr. 3, kann viðmerkjast, at her kann m.a. vera talan um at Landsstýrið ásetir reglur, sum geva Arbeiðseftirlitinum møguleikar fyri at krevja sýn, av t.d. tekniskum hjálpartólum, áðrenn tey vera tikin í nýtslu.

## Kapittul 7: (evni og tilfar)

Reglurnar um evni og tilfar hava ikki áður verið lógarfest í stórvegis mun, og er tað eisini fyri

kortum, at grannalond okkara hava ásett nærri lógarreglur á hesum øki. Sum kunnugt verður framleitt nógv nýggj kemisk evnir, har ein partur hevur víst seg at vera heilsuskaðiligur.

Kanningar í grannalondum okkara hava víst, at kunnleiki er um meira enn 200.000 evnir, sum eru eitrandi, og hvørt ár økist hetta tal við uml. 5 - 6.000.

Mett verður tí, at tað er sera umráðandi, at fyribyrgjandi tiltøk verða sett í verk á øllum økjum.

Miðað eigur at vera ímóti, at einki evni ella tilfar, verður nýtt í framleiðsluni, áðrenn full greiða er fingin á, hvat árin hetta kann hava á menniskjalikamið.

Víst verður á, at reglurnar í hesum kapitli eisini eru galdandi fyri arbeiði, sum ikki verður framt fyri arbeiðsgevara, umframt tað arbeiði, sum nevnt er í § 2, stk. 2, samanborið við grein 2, stk. 3, nr. 4 í lógini.

Í Danmark hevur Arbeiðseftirlitið í samráð við Umhvørvismálaráðið frá 1977, skrásett evnir og tilfar, sum nýtt verður í arbeiðsumhvørvinum.

Viðv. § 41:

Lógargreinin fevnir um bæði framleiðara og brúkara, uttan aðrar avmarkingar enn tær, sum eru ásettar í § 3.

Evni og tilfar kann vera í føstum formi, flótandi ella í luftformi.

Evni fevnir um rávøru, og partvís og liðugt framleiddan úrdrátt.

Sambært lógarregluni, so skal framleiðarin tryggja sær, at evnini og tilfarið, bæði í samband við framleiðsluna og í samband við nýtsluna, eru í einum slíkum formi, støðu, innbjálving v.m., soleiðis at arbeiðið kann fara fram, fult forsvarliga, við atliti til trygd og heilsuvanda.

Lógarreglan førir eisini við sær, at brúkarin (privatur, arbeiðsgevari, arbeiðsleiðari og starvsfólk) skulu tryggja sær, at tær arbeiðsgongdir, sum nýttar verða í arbeiðinum, greitt tryggja arbeiðarunum móti vanlukkum og sjúku.

Brúkarin skal tí kanna, um tað evni og tilfar, sum brúkt verður, hevur vandamiklar eginleikar.

Í hesum sambandi kann hann fáa vegleiðing hjá Arbeiðseftirlitinum.

Viðv. § 42:

Tað sum nevnt verður í petti 1, 2, 3 og 4, eru bert dømi um tað, sum Føroya Landsstýri kann áseta nærri reglur um og kann sjálvsagt hugsast onnur umráðir, har tørvur eisini er á nærri fyriskipanum.

Viðvíkjandi 2. petti er at viðmerkja, at hendan lógarregla kann nýtast sum grundarlag fyri einum

sonevndum negativ lista, sum antin verður galdandi alment, ella innanfyri ávís økir ella arbeiðir.

## Kapittul 8: (hvíldartíð og frísamdøgur)

Hetta kapittul ásetir nærri reglur um hvíldartíð umframt undantaksreglur og serligar reglur innan ávís økir.

Reglurnar eru eisini galdandi fyri ung undir 18 ár, har ásetingarnar í kapittul 9 ikki hava givið hesum aldursbólki størri vernd.

Skyldu til at síggja til at starvsfólkið fær ta ásettu hvíldartíð og frísamdøgur, áliggur sambært revsiásetingini í § 65, arbeiðsgevaranum, arbeiðsleiðaranum og arbeiðsfólkinum.

Tann starvssetti kann ikki frásiga sær rættin til hvíldartíð ella frísamdøgur, uttan so, at heimild til tess beinleiðis er ásett í lógini, ella kunngerðum, sum skrivaðar eru út við heimild í lógini.

Skyldurnar eru bert galdandi í tí einstøku starvssetanini og forðar tí ikki fyri, at starvsfólkið tekur annað starv hjá øðrum arbeiðsgevara, og samlaða starvstíðin sostatt fer út um lógarinnar mark.

Viðv. § 43:

Tá nevnt verður at roknað verður frá tí at arbeiði byrjar, so er við hetta at skilja, tann tíð sum avtalað er millum arbeiðsgevaran og arbeiðsfólkið, um nær starvstíðin byrjar ella at henda starvstíð er ásett í høvuðssáttmála.

Um so er, at tað fyri tað einstaka arbeiðsfólki ikki er galdandi ein vanlig arbeiðstíð, t.d. orsakað av, at arbeiðið byrjar hvønn dag til ymiska tíð, má samdøgrið byrja frá tí, at arbeiðið veruliga byrjar.

Viðvíkjandi spurninginum um flutningur til og frá arbeiði, skal roknast við í arbeiðstíðina, er hetta ein meting sum má gerast í hvørjum einstøkum føri.

Har sum starvsfólk sambært sáttmála fær løn undir flutningi til og frá arbeiði, og vanlukkutryggingarskipanin er galdandi við flutning, har eigur hendan flutningstíð at verða roknað við í arbeiðstíðina.

Viðvíkjandi 2. petti er at viðmerkja, at reglan fult út ásetir, undir hvørjum viðurskiftum hvíldartíðin kann minkast niður í 8 tímar.

Sostatt er ikki møguleiki at minka hvíldartíðina á øðrum økjum, sjálvt um hesi økir kanska í ávísan mun líkjast teimum, sum nevnd eru í 2. petti.

Viðv. § 44:

Ráðið metir tað hava avgerandi týdning, at hendan lógargrein framvegis verður galdandi í Føroyum, hóast grannalond okkara tykjast at leggja minni dent á hesar ásetingar.

Tá nevnt verður, at halgidagsarbeiði skal vera til samfelagsins frama ella er neyðugt at varðveita virðir, so eigur hetta at vera tikið eftir orðunum, soleiðis at misnýtsla ikki fer fram av hesum undantaksmøguleika.

Viðv. § 45:

Eisini her eigur talan at vera um frávik, sum bert verður gjørt í undantaksføri, og bert tá tað er avgerandi neyðugt.

Tá frávikið verður skrivað í eftirlitsbókina ella annað líknandi skjal, eigur møguleiki eisini at vera fyri at kanna eftir, um misbrúk er farið fram í tí einstaka førinum.

Viðv. § 46:

Í teimum grannalondum, sum hava líknandi lógarreglu, er tað soleiðis, at Arbeiðseftirlitið, áðrenn frávik verður gjørt, letur álitisfólkið á arbeiðsplássinum gera sínar viðmerkingar, og í flestu førum, har frávik verður gjørt, er álitisfólkið og Arbeiðseftirlitið samd.

Viðvíkjandi 2. petti er at viðmerkja, at her er bert talan um einstaka hvíldartíð ella einstakt frísamdøgur, av tí at tá talan er um fleiri hvíldartíðir ella frísamdøgur, har ber til, um ikki annað, so munnliga at fáa loyvi í røttu tíð.

Viðvíkjandi 3. petti er at viðmerkja, at hesi frávik kundu hugsast at verið gjørd innanfyri fakøkir, har bæði arbeiðsgevari og arbeiðsfólk, umframt feløg teirra, eru samd um at tørvur kann vera á frávikum.

Viðvíkjandi 4. petti er at viðmerkja, at Landsstýrið, t.d. kann áseta, at høvuðssáttmáli kann gera frávik frá lógarinnar reglum, og t.d. undir hvørjum treytum hesi frávik kunnu verða gjørd.

Hugsanin við hesari reglu er, at hon kann nýtast í einstøkum føri, har ikki verður mett, at neyðugt er at fáa Arbeiðseftirlitið við í avgerðina.

Viðv. § 47:

Hesi frávik skulu sum orðingin sigur, bert fara fram, har hetta verður hildið at vera neyðugt.

Tá nærri verður kannað eftir, hvørjir persónar skulu vera fevndir av lógarorðingini, má hendan meting gerast útfrá teimum umstøðum, sum eru, m.a. um viðkomandi t.d. hevur ábyrgd av útinnanini av arbeiði við beinleiðis sambandi til hægstu leiðsluna, um viðkomandi hevur starvs-setanar og uppsagnarheimildir, um viðkomandi við avtalum, beinleiðis kann binda arbeiðsgevara sín, og um viðkomandi í størri mun kann leggja tilrættis arbeiðstíð sína, uttan at neyðugt er við

góðkenning frá hægstu leiðslu arbeiðsgevarans.

Viðv. § 48:

Í samband við tær ásetingar, sum verða framdar við heimild í hesari lógargrein, kann atlit verða tikið til bæði trygd og heilsu hjá starvsfólki og øðrum.

Í samband við ásetingar um avmarkaða arbeiðstíð kann eisini verða nærri ásett, at steðgur skal verða í arbeiðstíðini.

Náttúrligt er, um partarnir á arbeiðsmarknaðinum taka upp spurningin viðvíkjandi løn fyri tey arbeiðsfólk, sum koma undir nærri reglurnar, sum ásettar verða.

Týdningurin av § 47 eigur at verða samanborðin við § 35, og tá tørvurin á ásetingum sambært § 47 verður mettur, kemur tað m.a. at valdast um hvussu nágreiniligar reglur verða ásettar sambært § 35.

Tann avmarkaða arbeiðstíðin vil vanliga bert fevna um tað serliga arbeiði, sum kann verða vandamikið fyri trygd og heilsu.

## Kapittul 9: (Børn og ung undir 18 ár).

Viðv. § 49:

Í grannalondum okkara t.d. Danmark og Grønlandi er aldursmarkið 15 ár, men ráðið metir serliga við atliti til fiskivinnuna, at møguleiki eigur at verða fyri ung niður í 14 ára aldursmark at taka lut í t.d. fiskaarbeiði, soleiðis sum tað í stóran mun verður gjørt í løtuni.

Ansa eigur tó at verða eftir, at hesin aldursbólkur ikki verður settur til tað tunga og vandamikla arbeiði.

Tá tosað verður um vanligt arbeiði, so er talan um arbeiði í tænastu hjá arbeiðsgevara, t.v.s. t.d. starvspraktikkur verður ikki mettur sum vinnuligt arbeiði.

Við 2 petti er at viðmerkja, at landsstýrið t.d. kann áseta annað aldursmark fyri ávís arbeiði eins og serreglur kunnu ásetast.

Viðvíkjandi 3 petti er at viðmerkja, at í Danmark hevur arbeiðsmálaráðið við heimild í líknandi lógarreglum ásett, at børn undir 10 ár ikki skulu taka lut í slíkum lættari vinnuligum arbeiði.

Viðv. § 50:

Tá talað verður um "í vanligum førum", so eigur hetta at skiljast soleiðis, at møguleiki er fyri, at ung fólk, sum eru yngri enn 18 ár, kunnu luttaka í yvirtíðararbeiði.

Tað er ein fyritreyt, at hesin møguleiki bert verður nýttur undir serligum viðurskiftum og ikki støðugt og upp í saman.

Tó er tað ikki bert, tá talan er um heilt serstakar umstøður, at hesin aldursbólkur kann luttaka í yvirtíðararbeiði, men kann talan verða um t.d. yvirtíðararbeiði í samband við høgtíðir ella tílíkt.

Annað petti í lógargreinini ásetur størsta tímatalið og avmarkar harvið eisini yvirtímatalið hjá aldursbólkinum.

Hóskandi mat- og hvíldartíðir verður vanliga roknað frá ½ til 2 tímar.

Viðv. § 51:

Tá annað petti nevnir orði "vanliga", so skal hetta skyljast á tann hátt, at frávik bert eiga at verða gjørd í undantaksføri.

Tá samlaða hvíldartíðin skal verða 12 tímar um samdøgri, hevur viðkomandi rætt til at møta seinni enn vanligt til arbeiðis, har hann dagin fyri t.d. hevur arbeitt út á kvøldið.

Í Danmark er hvíldartíðin ásett at verða millum kl. 20.00 og kl. 06.00.

## Kapittul 10: (læknakanningar v.m.)

Viðv. § 52:

Ráðið metir, at ein fyritreyt fyri hesari lógargrein er, at Arbeiðseftirlitið og arbeiðsmedisinarin í stóran mun fáa høvi at gera tilmæli í samband við møguligar ásetingar, sum Føroya Landsstýrið við heimild í hesari lógargrein ásetur.

Náttúrligt hevði eisini verðið, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum, fakfeløgini innan fyri tey ymisku arbeiðsøkini fáa høvi at koma við sínum viðmerkingum, áðrenn endaligu reglurnar verða ásettar.

Sum orðingin sigur, so er tað ein treyt, at talan er um arbeiðsøki, har heilsuvandi kann verða.

Læknakanningar kunnu sjálvsagt eisini fremjast av starvsfólki har viðurskiftir áður kunnu hava ført við sær heilsuvanda, men har hesi viðurskifti seinni eru broytt.

Sum dømi hava teir í Danmark nevnt arbeiði við evninum asbest.

Slíkar læknakanningar kunnu m.a. hava týdning í samband við metingina um, hvat arbeiði viðkomandi skal hava framyvir, um so er at viðkomandi hevur verið úti fyri heilsuskaðiligum árini.

Við arbeiðsmedisinskar og arbeiðsheilsufrøðisligar kanningar er at skilja kanningar av tí árini, sum arbeiðsumhvørvið hevur á starvsfólki.

## Kapittul 11: (arbeiðsumhvørvisráð).

Viðv. § 53:

Ráðið vil mæla til, at Landsstýrið, har tørvur er á hesum, letur Arbeiðseftirlitið saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum gera konsekvensútrokningar í samband við at nýggjar kunngerðir verða settar í gildi við heimild í hesari lóg.

Ráðið viðmerkir tó, at hesar útrokningar ikki skulu nýtast til at seinka ella forða fyri, at ásetingarnar í lógini verða fylgdar við frammanfyri nevndu kunngerðum.

Sum orðingin vísir, so hevur landsstýrið heimild at áseta nærri reglur fyri virkið ráðsins m.a. hvørjar heimildir ráðið skal hava.

Tað er við hesum ráði, at t.d. partarnir á arbeiðsmarknaðinum fáa møguleika fyri, alt eftir teimum heimildum, sum Landsstýrið gevur ráðnum, at gera sína ávirkan galdandi í spurningum um arbeiðsumhvørvi.

## Kapittul 12: (Arbeiðseftirlitið).

Viðv. § 54:

Føroya Landsstýri er hægsti myndugleiki í samband við avgerðir, sum Arbeiðseftirlitið tekur.

Sambært § 56 kann Landsstýrið geva stjóranum fyri Arbeiðseftirlitinum tær heimildir, sum sambært lógini liggja hjá Landsstýrinum.

Viðv. § 55:

Hendan lógargrein vísir, at virkisøki hjá Arbeiðseftirlitinum er sera vítt, og er hetta eisini samsvarandi lógarreglunum í grannalondum okkara.

Viðvíkjandi 2. pkt. er at viðmerkja, at fyrireikingin av reglum sambært lógini eftir øllum at døma verður ein tíðandi táttur í arbeiðinum hjá eftirlitinum.

Viðv. § 56:

Viðv. § 57:

Ráðið metir, at hægsti umsitingarligi myndugleiki eigur at hava møguleika fyri, um tørvur er á hesum, at leggja ávís arbeiðsøki til aðrar stovnar enn Arbeiðseftirlitið.

Hendan regla er eisini galdandi í m.a. Danmark.

Viðvíkjandi 3. petti kann viðmekjast, at í Danmark eru við heimild í líknandi lógargrein gjørd kunngerð um gjald í samband við kanning av dampketlum, trýstroyndir av trýstbeholdarum, kanningar av lyftum v.m.

Viðv. § 58:

Hendan reglan snýr seg bert um fráboðanarskyldu í samband við hagfrøðisligar kanningar.

Viðv. § 59:

Hesar heimildir eru náturligar og eisini neyðugar, um Arbeiðseftirlitið á fullgóðan hátt skal røkja sínar skyldur.

Viðv. § 60:

Hendan reglan skal skiljast á tann hátt, at Arbeiðseftirlitið eftir umstøðunum kann banna t.d. arbeiði sum ikki lúkar lógarinnar krøv.

Í hesum sambandi verður eisini víst til teir kærumøguleikar og revsifyriskipanir, sum ásettar eru í lógini.

Viðv. § 61.

Ein tíðandi táttur í skráseting av tí eftirlitsarbeiði, sum gjørt verður, er eftirlitsbókin, sum umrødd verður í hesari grein.

Viðv. § 62:

Náturligt er, at starvsfólkið, sum starvast innan fyri lógarinnar øki eins og aðrir almennir myndugleikar og persónar hava tagnarskyldu.

Viðvíkjandi 2. petti er at viðmerkja, at reglan er neyðug fyri, at starvsfólkið ikki skal halda seg aftur við at senda inn klagu, tá grundarlag er fyri tí.

Viðv. § 63:

## Kapittul 13: (Kærur).

Viðv. § 64:

Kærufreistin er í Danmark sett til 4 vikur, meðan hon í Grønlandi er 8 vikur.

## Kapittul 14: (kriminalrættsligar fyriskipanir).

Endamálið við revsifyriskipanum er, sum við flest øllum revsitiltøkum, tann, at tey fólk, sum á ein hvønn hátt hava við arbeiðsumhvørvisspurningar at gera, tað verði seg sum arbeiðsgevari ella starvsfólk, skulu síggja tað álvara, sum lóggávuvaldi hevur lagt í hesar reglur, og at tær verða fylgdar.

Eisini skulu hesar revsireglur hjálpa til at halda t.d. arbeiðsgevara frá at royna at spara uppá rakstrarútreiðslur sínar við at slaka við teimum krøvum, sum lógin ásetir.

Viðv. § 65:

Ábyrgdin er subjektiv skilt á tann hátt, at brotini skulu verða framd antin við vilja ella við óansni.

Í Danmark er møguleiki fyri heftirevsing umframt bót.

Viðv. § 66:

Eftir orðingini er her talan um objektiva ábyrgd t.v.s., at ikki er neyðugt at talan er um vilja brot ella brot sum er framt við óansni.

Viðvíkjandi allýsing av "arbeiðsgevara", verður víst til viðmerkingarnar til § 11.

Viðv. § 67:

Í ásetingunum kunnu setast reglur um bæði objektiva og subjektiva ábyrgd.

Viðv. § 68:

Viðv. § 69:

Tá lógarreglan vísir á, at tann sum hevur foreldramyndugleikan skal verða vitandi um, at arbeiði er farið fram, so liggur í hesum eitt krav um, at talan skal verða um vilja brot.

Tað er tó eingin treyt, at tann sum hevur foreldramyndugleikan, beinleiðis hevur fingið persónin undir 18 ár at fremja slíkt arbeiði.

**Kapittul 15: (gildi og fyribilsreglur).**

Viðv. § 70:

Føroya Landsstýri 16.12.1991

Tinganes
100 Tórshavn
**att. Jákup Nielsen, fulltrúi**

Viðv.. uppskoti til løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi.

Vísandi til tær viðmerkingar og tey broytingaruppskot, sum send eru Landsstýrinum aftan á, at álit okkara var sent út til ummælis skulu vit við hesum boða frá, at Arbeiðsumhvørvisráðið hevur havt fund 12.12.1991 har skrivini frá teimum ymisku feløgunum og Tórshavnar Býráð vóru til ummælis.

Á fundinum vóru møtt:

Arne Poulsen
Ingeborg Vinther
Óla Jákup Guttesen
Høgni Højgaard
Birgerð Klein
Eli Davidsen.

Sum sakkøn hjálp var møttur Páll Nielsen, advokatur.

Ráðið hevði hesar viðmerkingar til tey einstøku skrivini:

**Føroya Arbeiðsgevarafelag:**

§ 7, stk. 1.

Ráðið er samt um at mæla til, at orðið "virkjunum" verður broytt til "virkinum".

Her er talan bert talan um eina málsliga broyting.

§ 9, stk. 3, 2. punktum.

Hendan skipan er sambært kunngerð galdandi í dag, og mælir ráðið tí til, at hetta uppskot verður standandi sum tað er í áliti okkara.

§ 10, viðmerkingarnar, stk. 4.

Ráðið mælir til at broyta viðmerkingarnar, soleiðis at hesar vera eins og viðmerkingarnar til § 8, stk. 2.

§ 14, stk. 1.

Ráðið metir ikki tað er heppi at broyta verandi uppskot okkara, av tí at tað ikki skal bera til hjá arbeiðsgevarum at skúgva sær undan ábyrgd fyri teimum vanlukku- og heilsuvandum hann hevur ella átti at havt kunnleika um bert við at vísa til, at hann ikki hevur fingið ráð um hetta frá Arbeiðseftirlitinum.

Mælt verður tí til, at verandi orðing verður standandi.

§ 18, stk. 2.

Um vit broyta orðingina, er vandi fyri, at orðaskifti so fer at taka seg upp um hvat arbeiðsgevarin (skrivliga) liggur inni við ella ikki, og fer hetta eftir ráðsins meting at tarna endamálinum við lógargreinini.

Mælt verður tí til, at uppskotið verður standandi sum í áliti okkara.

§ 50, stk. 2.

Ráðið loyvir sær at vísa á, at sambært 3. petti í hesari lógargrein, so kann Føroya Landsstýri seta serligar reglur í gildi, og kann hetta sjálvsagt eisini fevna um fiskivinnuna.

Ráðið metir tí, at tað ikki er rætt at broyta verandi uppskot.

§ 59, stk. 2.

Ráðið vísir á, at hetta er sama orðing sum í verandi lóg, og meta vit tí ikki, at tað er rætt at broyta uppskot okkara.

§ 59, stk. 3.

Eingin grundgeving er fyri hesum uppskoti um broyting av verandi uppskoti, sum er einsljóðandi við lógarorðingina í grannalondum okkara.

Ráðið vil tí mæla til, at uppskotið verður standandi sum tað er í uppskoti okkara.

§ 61.

Víst verður í hesum sambandi til § 33 í verandi lóg, og kann ráðið viðmerkja, at tey einki hava í móti, at Arbeiðseftirlitið skal útflýggja slíka bók, um arbeiðsgevararnir rinda fyri bókina.

**Føroya Arbeiðarafelag:**

§ 64 (habilitetsspurningurin).

Vit vilja mæla til, at Arbeiðsumhvørvisráðið gongur út sum kæru-

stovnur, soleiðis at kærur yvir avgerðir, sum Arbeiðseftirlitið hevur tikið verða kærdar beinleiðis til Landsstýrið.

Sostatt verður mælt til, at í § 64, stk. 1 gongur orðið "Arbeiðsumhvørvisráðið" út, og inn verður sett í staðin "Føroya Landsstýri".

Sostatt verður mælt til at strika verandi uppskot til stk. 2.

Stk. 3 verður so stk. 2 og stk. 4 verður stk. 3.

<u>§ 53, stk. 2</u>.

Av tí at limirnir í Arbeiðsumhvørvisráðnum vóru valdir fyri nøkrum árum síðani, og tey umboðini sum sótu 2 ár, eru afturald verður mælt til at 2. og 3. punktum í stk. 2 verður strikað, soleiðis at stk. 2 verður soljóðandi:

> "Landsstýrið tilnevnir umboðini og sama tal av tiltaksumboðum fyri eitt 4 ára starvsskeið".

<u>§ 44</u>.

Ingeborg Vinther segði seg standa við uppskotið frá Føroya Arbeiðarafelag um broyting av uppskotinum til § 44, men hinir 5 limirnir sum vóru á fundi vístu á, at tað neyvan verður møguligt at fáa eina lóg at rigga eftir orðingini, um so er, at tað verður knívskorið, at eingin skal arbeiða sunnu og halgidagar, uttan formligt loyvi frá ráðnum.

Hesir limir mæla tí til, at uppskotið hjá ráðnum verður standandi.

**<u>Føroya Kommunufelag:</u>**

Ráðið vísir her á, at her tykist misskiljing vera komin í, av tí at kapitul 8 og 9 í lógaruppskotinum er ein náttúrligur táttur í arbeiðsumhvørvislógini, og hava grannalond okkara eisini hendan

táttin við í lógini.

Mælt verður tí til, at uppskot okkara verður standandi.

<u>**Føroya Byggifrøðingafelag:**</u>

Viðvíkjandi fyrra partinum av skrivinum frá felagnum verður víst til viðmerkingarnar til lógaruppskotið har beinleiðis verður viðmerkt, at høvuðsendamálið hjá ráðnum hevur verið at skapa eina lóg, sum er tillagað eftir teimum serføroysku viðurskiftunum, og hevur ráðið gjørt endaliga uppskot sítt út frá hesum sjónarmiði.

Vit loyva okkum eisini at vísa á, at felagið tykist at hava misskilt uppskotið, og kunnu vit her sum dømi vísa á viðmerkingarnar til § 67 og 69.

Annars er stórur partur av viðmerkingunum sum vit síggja tær orðaskifti um orð ella málsligar vendingar.

Ráðið kann tó ikki taka undir við teimum broytingaruppskotum, sum felagið mælir til.

<u>**Føroya Lærarafealg:**</u>

Eingin ivi er um, at lógaruppskotið eisini fevnir um skúlan sum arbeiðspláss, men ráðið er samt í, at tørvur kundi verið á meira útgreinaðum reglum fyri serstøk arbeiðspláss sum t.d. skúlan, men meta vit ikki tað er møguligt innan fyri karmarnar á einari almennari lóg at føra inn slíkar serreglur, sum eisini kundi verið tørvur á innan fyri onnur arbeiðspláss sum t.d. flakavirkir.

<u>§ 53, stk. 1 og § 64, stk. 1</u>.

Her vísa til tilmæli okkara viðvíkjandi viðmerkingunum frá Føroya Arbeiðarafelag.

**Føroyskir Ergoterapeutar, Føroyskir Fysioterapeutar, Føroyskir Fysioterapeutar, Økonomafelag Føroya og Ljósmøðrafelag Føroya:**

Ráðið kann viðmerkja, at tað ikki er ósamt í, at skilagott er at fáa so nógv sjónarmið sum til ber við, tá ráðið viðger eitt mál, og kann hetta m.a. gerast við, at umboð fyri so nógv starvsøkir sum til ber fáa sæti í ráðnum.

Ráðið loyvir sær tó at vísa á, at um talið á ráðslimum gerst ov stórt, er vandi fyri, at arbeiðsgongdin verður ov stirvin.

Viðmerkjast skal tó, at sum nú er, so hava allir starvsbólkar møguleika fyri av sínum eintingum at seta seg í samband við ráðið, og hevur ráðið eisini møguleika fyri at kalla inn slíkar starvsbólkar, tá talan er um málsøkir, sum serliga viðvíkja teimum ymisku starvsbólkunum.

Ætlanin við samansetingini av Arbeiðsumhvørvisráðnum er eisini, at teir limir, sum tilnevndir vera fyri ávikavist arbeiðsgevarasíðuna og løntakarasíðuna ikki bert skulu umboða tað einstaka felagið har limurin hoyrir heima, men ávikavist alla arbeiðsgevarasíðuna og alla løntakarasíðuna.

**Føroya Handverkarafelag:**

Føroya Handverkarafelag tekur sum kunnugt undir við uppskoti okkara.

**Maskinmeistarafelagið:**

Vit vísa her til § 3 í lógaruppskoti okkara, og serliga til viðmerkingarnar, sum í álitinum eru gjørdar til hesa lógargrein.

Starvsmannafelagið:

Her verður víst til tær viðmerkingar, sum frammanfyri eru gjørdar til skrivið frá Føroya Arbeiðarafelag.

Føroya Pedagogfelag:

Ráðið vísir her til høvuðsendamálsgreinina í lógaruppskotinum.

Hetta er sama orðing sum § 1 í donsku lógini, og kunnu vit viðmerkja, at í kommentarinum til "arbejdsmiljøloven" verður á bls. 40 beinleiðis viðmerkt, at tá ið lógin nýtir orðingina "tryggum og heilsugóðum arbeiðsumhvørvi", so skal hetta takast í víðari merking, og skal lógin verja móti árini, sum kann hava við sær bæði likamligan og sálarligan skaða.

Vit meta tí, at lógin lúkar tær treytir, sum felagið vil hava við í lógina.

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya:

1. Samstarv við Vanlukkutryggingina.

Vit eru samd í, at slíkt samstarv bert er gagnligt.

2. Branchutrygdarskipan og bedriftssundhedstjenesten.

Her kann viðmerkjast, at Arbeiðseftirlitið longu nú skipar fyri útbúgving av fólki innan serstakar vinnugreinir sær.

Viðvíkjandi bedriftssundhedstjenesten í Danmark, so er her talan um eina sjálvstøðuga skipan við síðuna av sjálvum Arbeiðseftirlitinum, og rinda arbeiðsplássini sjálvi fyri hesa skipan.

Talan er um ráðgevandi virksemi hjá hesari skipan.

Ráðið hevur ikki mett, at neyðugt er við hesari skipan hjá okkum, men kann eg viðmerkja, at vit hava væl skikkaða ráðgeving tøka frá m.a. ergoterapeuti og arbeiðsmedisinara.

3. Samanseting og skipan av Arbeiðsumhvørvisráðnum.

Vit duga ikki reiðiliga at síggja, hvussu vit kunnu skipa grunnin, sum her verður mæltur til at seta á stovn.

Viðvíkjandi kærugongdini vísa vit til viðmerkingar okkara til skrivið frá m.ø. Føroyskum Ergoterapeutum.

4. Formansskapurin í Arbeiðsumhvørvisráðnum.

Her vísa vit eisini til viðmerkingarnar okkara til skrivi frá Føroya Arbeiðarafelag.

5. Umboð í Arbeiðsumhvørvisráðnum.

Vit vísa her til viðmerkingar okkara til skrivi frá m.ø. Føroyskum Ergoterapeutum.

§ 36.

Vit hava frá m.ø. fútanum fingið váttan um, at slíkar fyriskipanir kunnu vera settar í gildi uttan at tær í sínari heild vera kunngjørdar, og er hetta eisini vanligt, tá ið fólkatingslógir verða settar í gildi í Føroyum.

**Tórshavnar Býráð:**

1. Endamál og øki.

Vit meta tað vera ógjørligt út í æsir at greina út í einari lógarorðing, hvat skiljast skal við trygd- og heilsu.

Her kann eisini vísast á, at hugsanin um slík fyribrigdi eisini

kann broytast við gongdini í samfelagnum, og er tað tí óheppi, um so er, at ein lógarorðing læsti fast, hvat skiljast skuldi við hesi fyribrigdi.

Tá nevnt verður, at lógin fevnir um arbeiði fyri arbeiðsgevara, og at lógin átti at havt greiðari reglur um útinning av arbeiði, arbeiðshátti og arbeiðstrygd, so halda vit, at lógaruppskotið lúkar hesar treytir.

Í sambandi við samanberingina við Grønland, so vísa vit til viðmerkingarnar frammanfyri har vit hava víst á, at í álitinum verður gjørt greitt, at endamálið er at skapa eina lóg, sum er vælegnað til tey serføroysku viðurskiftini.

2. Umsitingarvøkstur.

Vit kunnu viðmerkja, at tær skipanir, sum sipað verður til her, longu eru lógarkravdar.

Viðv. Arbeiðsumhvørvisráðnum, so kunnu vit vísa til, at onnur feløg hava mett, at hetta ráð skuldi havt enn fleiri limir, soleiðis at vit á best møguligan hátt røkka endamálinum nevniliga at fáa so nógvar og fjøltáttaðar metingar sum til ber við, tá tilmælir og ráðgevingar skulu latast úr hondum.

3. Tvíumsiting.

Vit duga ikki at síggja, at talan her er um tvíumsiting, og kunnu vit tí ikki taka undir við viðmerkingunum í skrivi Býráðsins.

4. Heimildir.

Vit vísa her á, at talan er um somu heimildir, sum líknandi stovnur hevur í grannalondum okkara, og meta vit eisini at tað er neyðugt at stovnurin hevur hesar heimildir um hann til fulnar skal kunna røkja uppgávur sínar.

Til 2. petti viđv. § 64 vísa vit til viđmerkingar okkara til skrivi frá Føroya Arbeiđarafelag.

Vinaliga

Arbeiđsumhvørvisráđiđ